

## Lív Næs fær sanglegat

Tórshavnar kommuna umsitur eitt sanglegat, og nevndin hevur avgjørt at lata til ungu songkvinnuna Lív Næs. Sanglegatið er stovnað til minnis um Sannu Dahl Waagstein. Nevndin fyri sanglegatið helt fund hósdagin 19. november 2009. Eftir umsókn varð samtykt at lata Lív Næs stuðul í sambandi við sanglæru í solosangi. Nevndin samtykti at lata Lív Næs kr 10.000 í stuðuli. Tey, ið manna Nevndin fyri sanglegatið til minnis um Sannu Dahl Waagstein eru Heðin Mortensen, Bjarni Bæk og Sanna í Brekkunum. Jákup Simonsen er skrivari.

## Gamlar bøkur um Grønland

Frálærubøkurnar, sum donsk skúlabørn brúka, tá tey skulu læra um Grønland og grønlendsk viðurskifti, eru avoldaðar. Tað sigur grønlendska fólkatingskvinnan Doris Jakobsen, sum vil hava danska skúlamálaráðharran, Bertel Haarder, at dagføra frálærutilfarið. Doris Jakobsen sigur við grønlendska kringvarpið, at grundleggjandi og dagførd vitan um Grønland er ein fyritreyt fyri javnbjóðis samstarvi millum Danmark og Grønland. Bertel Haarder hevur fyrr ásannað, at frálærutilfarið um Grønland, sum fólkaskúlin brúkar, er ikki tíðarhóskandi.

Skálaberg-málið dregur út:

# - Eg haldi ikki hetta er hevnd



**Russiski konsulin í Føroyum, Árni Dam, ásannar, at ein ávísur kinkur er komin í góða samstarvið, sum í so mong ár hevur verið millum Føroyar og Rusland. Hann heldur, at ein gongd leið at finna aftur á beint er, at Føroya løgmaður bjóðar russiska sendimanninum í Keypmannahavn til Føroyar at tosa um viðurskiftini**

SAMSTARV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum, heldur tað vera ógvuliga keðiligt, at Skálaberg er afturhildin á reduni í Murmansk í 14 dagar uttan at vita, hvussu verður. - Eg haldi kortini, at vit mugu royna at loysa hetta mál á sømiligan hátt og í allari hampiligheit, sigur hann*

Føroyski verksmiðjutrolarin Skálaberg liggur framvegis á reduni út fyri Murmansk, og í dag eru 14 dagar, síðan russiska vaktartænastan tók skipið til lands.

Høvuðsorsøkin til tøkuna sigst vera, at trolarin hevur fiskað av kvotu, sum Sundaberg eigur, og eisini hava russar eftir hvat skilst heft seg við onnur viðurskifti, sum teir ikki eru nøgdir við.

### Skiparin í land

14 dagar er long tíð at liggja, og serliga dátt kemur hetta við hjá JFK-Troli, sum eigur skipið, nú avtala er gjørd um sølu við einum ávísum skeringsdegi, sum er við at renna út.

Fyrr í vikuni frættist, at russisku myndugleikarnir skuldu koma við einum sektaruppskoti í gjár, men dagurin gekk, og einki sektaruppskot kom.

Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum, visti í morgun at siga, at skiparin á Skálabergi stundisliga í morgun var farin í land við sakførara og meklara sínum at hitta russiskar myndugleikar í eini roynd at loysa málið.

- Bæði JFK-Trol og vit á Faroe Agency hava heitt á russar um at koma við einum sektaruppskoti, so málið kann loysast, og skipið kann leysgevast aftur.

Russiski konsulin sigur seg tó ikki vænta, at nakað fer at spyrjast burtur úr fyrr enn í fyrsta lagi móti kvøldi.

- Eg vóni virkuliga, at málið verður loyst í dag, tí hetta er ein ógvuliga keðilig støða, bæði fyri manningina, sum nú hevur verið umborð á skipinum í 14 dagar – og eisini fyri tey annars so góðu viðurskiftini, sum í so mong ár hava verið í samstarvinum millum Føroyar og Rusland.

Árni Dam sigur seg einki tora at siga og vænta um, hvat – og um nakað – man fara at spyrjast burtur úr í dag.

### Eingin neyð

Russiski konsulin í Føroyum sigur, at tá skip soleiðis verður afturhildið, og manningin gongur umborð í so langa tíð, er skjótt, at søgur fara at ganga.

- Soleiðis er eisini í hesum førinum. Eg eri uppringdur av fólki, sum ikki øll hava verið líka pen í munninum.

Árni sigur, at hann hevur havt regluligt samband við skiparan á Skálabergi, og umborð á skipinum er eingin neyð, tó at støðan er ógvuliga keðilig.

- Tað ljóðaði herfyri, at drekkivatnið hjá teimum var farið at ganga undan og onkur, sum ringdi til mín her úr Føroyum, segði, at menninir noyddust at gera sær vatn burtur úr kava á dekkinum. Eg ringdi beinanvegin og bað um 30 tons av vatni til skipið. Teir søgdu seg vilja geva skipinum vatn longu sama kvøld, men komu ikki fyrr enn dagin eftir. Eg vænti, at tangabáturin hevur verið so nógv upptikin hendan dagin.

Hann sigur, at eftir umborð á Skálabergi vóru umleið 5 tons av vatni, tá russar komu við nýggjum vatni til skipið.

- Vit kunnu ikki umgangast, at tað altíð eru onkrar keðiligar tungur inn ímillum, men tað mugu vit bar liva við. Soleiðis er tað nú einaferð, leggur Árni Dam aftrat.

### Hava roynt

Russiski konsulin í Føroyum sigur, at Faroe Agency hevur tveir russar í starvi, harav annar tosar reint føroyskt.

- Vit hava roynt, hvat vit hava kunnað, og vit hava havt samband við russisku sendistovuna í Keypmannahavn fyri at vita, um teir kunnu hjálpa okkum. Tey í Keypmannahavn hava so sett seg í samband við myndugleikarnar í Moskva.

Hann sigur, at nú skiparin á Skálabergi er farin í land í í morgun saman við sakførara og meklara at hitta myndugleikarnar har, vónar hann so inniliga, at málið umsíðir verður loyst.

Árni Dam sigur, at tað hava eingir trupulleikar verið at at sett seg í samband við skipið hesar dagarnar, tað hevur ligið á reduni út fyri Murmansk.

- Men eg tori einki at siga um dagin í dag, og eg dugi slett ikki at siga, hvørjar vónirnar eru. Skipanin í Ruslandi er nokso tung og tað einasta, vit kunnu gera, er aftur og aftur at seta okkum í samband við russar.

Hann vísir á, at tað er næstan ógjørligt at koma í beinleiðis samband við teir myndugleikar, sum hava tikið avgerðina um at biðja vaktartænastuna taka Skálaberg.

- Vit hava sera gott samstarv við eitt stórt russiskt